Tvingsilssøla

Mikudagin tann 9. januar 2013 kl. 13.00 verður á uppboðssølu, á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, seld sethúsaognin matr.nr. 47, Syðrugøta, Úti í Bø 24, FO 513 Syðrugøta.

Talan er um grundøki til støddar 466 m2 við ástandandi sethúsum bygd í 1958 innrættað í 2 hæddum umframt bilhúsi.

Búøkið er 132 m2, við hesari innrætting:

Ovara hædd:
Gongd, køkur, spísistova, stova, 2 kømur, lítil gongd og wc.

Veghædd:
Kjallararúm/vaskirúm, goymslurúm, gongd, køkur/stova, kamar, baðirúm v/brúsu umframt bilhús.

Húsini, sum eru í friðaligum umhvørvi, hava eisini gott ovastaloft, eins og snøggur garður hoyrir til ognina.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Páll Nielsen, advokat, J.H.Schrøtersgøta 20, 100 Tórshavn (j.nr. 84-2012), tlf 312171, pall@advokatvirkid.fo ella sigrid@advokatvirkid.fo.

Føroya Fútarættur
tann 26. november 2012.

Tvingsilssøla

Mikudagin 9. januar 2013 kl. 11:00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 237 a, Vágur (AS nr. 2-45/2012).

Sambært tryggingarskjalinum er bygda økið 150 m2, og sambært tingbókini er grundøkið 282 m2.

Húsini eru innrættað í tveimum hæddum.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Stovuhædd: Inngongd við lemmi niður í kjallara, WC við vask og toilet, kamar, køksrúm (eingin komfýrur og einki køliskáp) og stova.

Kjallari: Lítil inngongd, kamar, gongsrúm við trappu uppá, WC við vask, toilet og baðikari, kamar, kjallararúm við oljufýri og oljutanga.

Húsini eru í ringum standi og treingja til viðlíkahald og ábøtur.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040 (sak nr. 5385201), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur
tann 26. november 2012.

Tvingsilssøla

Mikudagin 9. januar 2013 kl. 10:30 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 24, Leirvík (AS nr. 2-53/2012).

Sambært tryggingarskjalinum er bygda økið 70 m2, og sambært tingbókini er grundøkið 205 m2.

Húsini eru innrættað í tveimum hæddum.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Stovuhædd: Gongd við trappu upp á loft, køkur/stova í einum, kontór, vaskirúm og fýrrúm. Frammanfyri úthurðina er inngongd til hjall, sum er fastur uppií húsinum.

Loft: Gongd, trý kømur og baðirúm við vesi, vaski og brúsu.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040 (sak nr. 5456901), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur
tann 26. november 2012.

Tvingsilssøla

Mikudagin 23. januar 2012, kl. 14:30 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 264 Tórshavn (AS nr. 2-54/2012).

Ognin, ið liggur Tróndargøta nr. 27 og 29, er sambært skráseting, ein eldri bygningur í 3 hæddum, har veghædd er handilshøli til støddar uml. 70 m2 við framsýningarhøli, lítlum skrivstovuhøli, wc og lítlum goymslurúmi.

Omaná eru bygd eini sethús við høgari reising uml. 50m2 hvør hæddin, í neðra lítil hjallur, inngongd, køkur og stova og á ovastu hædd eru baðirúm og 3 sovikømur.

Húsini hava miðstøðuhitaverk.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvani Páll Lassen, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040 (sak nr. 8801612), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya fútarættur
tann 26/11-2012.

Tvingsilssøla

Mikudagin, 9. januar 2013 kl. 11.30 , verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 1045 bt, Tórshavn.

Talan er um helvtina av einum tvíhúsum, bygd 2009. Grundøkið er 300 m2, húsini eru í trimum hæddum, 70 m2 hvør.

Kjallari: tvey kjallararúm, trappurúm.

Miðhædd: durur, gangur, køkur, stova, baðirúm v/brúsu.

Loft: trappurúm, hjúnarúm, tvey kømur og baðirúm við vaski og wc.

Einki er gjørt uttanfyri. Húsini krevja ábøtur.

Nærri upplýsningar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patusson, advokatur, Frúutrød 4, Tórshavn, tel. 353335 frp@jura.fo (j.nr.201207123) ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen aro@jura.fo.

Føroya fútarættur
tann 26/11-2012.

WWW.SOSIALURIN.FO



Lýsingartorgið

Akfør

Toyota Carina 2,0
árg. 1991 er í sera góðum standi, sýnaður 28.01.2011 og gókendur. Er vælviðfarin hevur 2 sett av summardekkum á felgum, 1 sett av píkadekkum á felgum, er til sølu
Tlf 441225 ella 281225

Amboð

Minigravari til leigu
Er vælegnaður til t.d. dren, urtagarðsarbeiðið og kann arbeiða í kjallara. Brekkari og minidumpari kunnu fylgja við. Stendur á vogni
Ring 213992

Arbeiði

Vaskihjálp
Vaski hjálp søkist til at halda íbúð á 45 fermetrar.Uml. 2 tímar um vikuna.Áhugadi kunna skriva til bokhald@tatanka.fo

Bingo

EB-Streyma Bingo
Bingo verður við Margáir mánakvøldið 3. des . kl. 19
EB-Streymur

Býli í Føroyum

Stór, ljós og góð íbúð
í vesturbýnum í Havn til leigu. 2 stovur, 3 kømrur, altan, vaskikjallari og hjallur Við blindveg nær miðbýnum og góðum útsýni.
21 79 42

íbúð í Havn ynskist til leigu
Íbúð í Havn til tvey fólk ynskist skjótast gjørligt til leigu, helst 2 kømur
223184

Íbúð søkist
Ungur maður søkir íbúð í Tórshavn ella Runavíkar økinum. Prísur 4000 - 5000 kr við øllum. Gjaldi til tíðina
Tlf 594234

Hús ynskjast í Eysturoy
Vit ynskja at leiga eini hús í Eysturoy (Saltangará,Glyvrar,Toftum,Ritu/æðuvík,Lamba) Best er um húsini hava kjallara, og eru í rímiligum standi.
562222

Kamar til leigu
Kamar til leigu í miðbýðnum í Havn: Felags køk/bað og internet.
Tlf. 216363

Ymiskt

Kjallarasøla
So er aftur kjallarasøla á Varðagøtu 57. T.d. steintoy, krystall, postalín, bøkur, teaklutir, jólanissur o.o jólating. Frá 28.nov. til 7.des.
312718

Flytigóðs
Pláss er fyri flytigóðsi til Danmarkar,farið verður 29. november. ring 281282
281282

Basarur
Basarur verður í KFUK varðagøta 9 leygardagin 1. des. kl. 15.00, við eydnuhjóli, mat og køkutombola, loppumarknaði, borðsølu og konditttaríið. Nógvir góðir vinningar at vinna. Øll eru vælkomin
311928 / 211824